# Hvat ætla vit við fiskivinnuni

VIBERG SØRENSEN



Nú í langa tíð hevur fiskivinnan og fiskidagaskipanin verið vitni til eina óverdiga viðgerð, sum ikki hevur gagnað nøkrum. Ein hópur av fólkum hava sagt sína meining um fiskiskap, nógv tey flestu hava ongantíð verið í vinnuni og hava sostatt bara teoretiska vitan. Alt gott um tað, men tað kan ikki verða meiningin, at ein skal sita og krympa tærnar av nógvum av tí sum er skrivað.

Onkur í vinnuni hevur dytta sær at muta ímóti, men tær meiningarnar eru ofta skúgvaðar til viks. Teir flestu sum eru í vinnuni, eru úti har sum tilfongið er, kenna sítt abreiðsspláss bæði frá góðum og ringum tíðum, kenna hvønn kant ,hvørja helling og eru veruliga á heimabeiti á havinum. Hesir serfrøðingarnir standa mangan og undrast yvir tað sum fer fram undir vatnskorpuni, men soleiðis er náttúran og tá ein livir so tætt í skapanarverkinum góðtekur ein eisini at so er, teir koma ikki við longum frágreiðingum um fyribrygdi sum vit ikki skilja. Menn sum hava brúkt alt lívið í fiskiskapi mugu metast at verða serfrøðingar og sjálvandi skal lurtast eftir teimum.

Orrustan um fiskidagarnar er av á hesum sinni, og nú er so endiliga friður á váli aftur, men hetta er bara til næsta ár, tá alt fer at endurtaka seg.

Vit sum vóru í Løgtinginum og fylgdu við viðgerðini av fiskidøgunum, eru ikki vorðnir bjartskygdari. Um hetta verður gongdin framyvir sær ikki gott út. Hvør ferð at figgja eina so óstabilt stýrda vinnu, hvat sigur unga fólkið sum fylgir við, fara tey at satsa framtíðina í vinnuni.

Lat okkum bara verða erligar og ásanna at hetta kan ikki halda fram, her mugu allir sum varða av seta seg saman at eftirmeta og síðani seta útí kortið, her má snøgt sagt ein tjóðarsemja til, vit kunnu ikki bara lata standa til.

Spurningurin er um politikkarnir ikki skullu haldast uttanfyri, tað sær út til at tá teir teir koma uppí leikin, verður fløkjan bara uppaftur størri og nú hava teir rykt alt so saman at nú má knívur á.

Tí var tað av sonnum ein lætti at koma til Klaksvíkar nú Sjómannadagurin var beint aftaná uppgangin í Løgtinginum. Fiskaríministarin var ikki at kenna aftur, mól rundanum fiskidagarnar sum veruliga eru stridens æble, tá hann røddi um lakkskógvar og velafrakkarnar í Havn

Hetta tiltakið sum tit í Klaksvíkini hava gjørt, hevur nógv størri týdning fyri vinnuna enn tit droyma um, hetta festir seg í sinni og tey sum ikki hava kunnleika til sjógvin fingu, eitt gott upplivilsi.

At ganga har framvið gomlu sluppunum fekk hugin at reika aftur til tað ófatuliga stríð og strev okkara forfedrar høvdu. Og so sóu vit nútíðina hinumegin vánna umboðaða av nýmótans stásiligum skipum, jú sanniliga hevur framburður verið her á landi og hetta kemur bara av einum ágrýtnum og røskum fólki.

Øll tiltøkini vóru sera væl fyriskipaði, har sóu vit hesar ungu garparnar kappast í egning, trolbøting og øllum hinum kynstrunum sum teir eru blivnir serfrøðingar í, hetta vóru umboðini sum eru sjálv tjarnan í vinnuni. Tað sum vit sóu í kappingunum kann ikki lærast úr bókum, tað er bert í lívsins skúla í skúrinum, við rulluna, við snelluna, á troldekkinum, afturi í slippuni og mangan undir høvd í ísakøldum sjógvi.

Tað er gott at skipað er so fyri at øll nú kunnu fáa ein lítlan færra av vitan um vinnuna við at síggja við egnum eygum hvat tað er teir fáast við og at teir kunnu vísa hvat teir duga. Tað hevði verið upplagt hjá skúlaklassum at vitja Sjómannadagin og sæð kynstrið.

Svartskygnið úr Løgtinginum lætti tá vit sóu fiskassarnar við livandi fiskum, har hingu ungir alvar á búkinum við uppbrotnum ermum og krámaðu niður í vatnið eftir toskunum sum har svumuveiðimannangenið fornoktar seg ikki, og Gud havi lov fyri tað.

Sjómannadagurin er komin fyri at verða og umhvørvið har á Stongunum í okkara fremsta fiskivinnubýi er frálíkt, ja finst ikki betur her á landi. Skilliga sást at fyrireikarnir hava gjørt eitt megnar arbeiði og takk skullu tit hava fyri tað, allir norðingar kunnu verða stoltir av Sjómannadegnum.

At so Klaksvíkin eisini fyllti 100 ár gjørdi dagin uppaftur tignarligari, tillukku Klaksvík.

# Hvat meinar Høgni?

EYÐUN MOHR VIDERØ



Politiska lendið hevur nú í longri tíð verið á gosi!

Seinasta trupulleikan átti Tjóðveldið. Ein tingmaður vildi ikki fylgja flokkinum í fiskivinnupolitikkinum. Á tingsins røðarapalli boðaði Høgni Hoydal frá, at atkvøddi flokkurin ikki samlaður fyri uppskotinum, so var flokkurin ikki borðbarur at umsita fiskivinnuøkið og fór tí úr samgonguni.

Aftan á drúgvt fundarvirksemi kemur Høgni nú fram og sigur, at flokkurin verður verandi í samgonguni, tó uttan álit á Heina.

Uppá fyrispurning í útvarpinum vavdi hann rundan um søgdu orðini á tingi, at tað "var ikki soleiðis, orð hansara skuldu skiljast, øll hava misskilt hansara úttalilsi" o.s.v. o.s.v.

Hetta er ikki ókent, tí hvørja ferð, Høgni er tikin á "skeiva" beininum, og tað er nú nógvar ferðir, so kemur tann regluliga frágreiðingin um skeiva tulking av orðum hansara!

Í hesum spentu politisku tíðum verður væl fylgt við, hvat hendir, og tí siti eg og helst fleiri við mær eftir við spurninginum: Hvat segði Høgni, og hvat meinti hann?

Sum formaður fyri størsta flokki á tingi eigur Høgni at sleppa sær av við handan óvanan at umskriva sína útsøgn, hvørja ferð onkur tekur í álvara tað, Høgni hevur sagt!

Ella er innast inni onki álvara í manninum?

# Heini stingur flokkin í bakið

KRISTIAN LAMHAUGE

Eftir eitt langt lív sum tjóveldismaður stingur tú flokkin í bakið og kastar teg í føvningin á Sambandinum og Fólkaflokkinum. Tað kann eita 10% ella 20%, men at offra allan flokkin í eini handavend mátti givið høvuðbrýggj.

Ikki skal man saga greinina av, sum ein sjálvur situr á.

# Fejlfortolkning af undersøgelsen af det færøske demokrati

OLE WICH

www.olewich.com



**Hallbera Fríða West overser væsentlige samfundsforhold og falder i en ældgammel grav i sine fortolkninger**

I Dimmalætting fredag d. 15. august skriver Hallbera Fríða West, stjórnmálafrøðingur, om undersøgelsen: "Medborgaraskapur og politisk mentan í Føroyum". Hun skriver:

*"... Men kanningin avdúkar tó eisini, at føroyingar ikki hava so stórt politiskt sjálvsálit, og at føroyingar samanborið við aðrar norðurlendingar ikki eru so nøgdir við demokratiið í Føroyum".*

*"Samanumtikið so kann sigast, at politiska mentanin í Føroyum er samansett. Í stóran mun er politiska mentanin í Føroyum eyðkend við eini demokratisk virknari mentan, men eisini við traditionellum siðvenjum og familjumynstrum. Harumframt tykist tann politiska mentanin í ein ávísan mun at vera merkt av ríkisrættarligu støðu Føroya".*

I fortolkningerne af undersøgelsen lægger Hallbera West vægt på at forskellen på den færøske politiske kultur og andre politiske kulturer i Norden kunne skyldes familiemønstrene, den geografiske isolation, det unge færøske demokrati og rigsfællesskabet.

Jeg enig i, at disse er forhold er mere eller mindre væsentlige parametre i den politiske bevidsthed og medborgerskab, men det undrer mig at hun udelader 3 andre væsentlige parametre i sin fortolkninger:

**1 - De religiøse kontrolfunktioner**

Hallbera West inddrager ikke den religiøse sociale og politiske kontrol i sin fortolkning. Hun skriver: *"Ein frágreiðing uppá lægri kvinnuumboðan í politikki enn í hinum Norðanlondunum, ... at Føroyar liggja so mikið avsíðis frá hinum londunum í kanningini, og at broytingar aðrastaðni tískil taka longri tíð at røkka til Føroyar. Henda støðan kann eisini verða orsøk til, at traditionel familjumynstur í størri mun verða varðveitt í Føroyum".*

De religiøse systemer på Færøerne indoktrinerer en masse folk til at tro på etablerede autoriteter og til at indordne sig tavst i hierakier, helst med en mand i toppen. Så denne ældgamle og konsekvente opdragelse i underdanighed er absolut relevant at tage i betragtning, når vi taler om demokratisk bevidsthed og kvinderepræsentation i demokratiet. De religiøse systemer har en tusindårig kønsskævvridning som grundforudsætning og de undertrykker traditionelt den frie tanke og ytring, der er grundlag for demokratiet.

**2 - Den sociale kontrol**

Den almindelig jantelov og den traditionelle angst for at stå frem og udtrykke sig offentligt er væsentlige forhindringer i det færøske demokrati.

**3 - Frygten for sprogpolitiet**

Hallbera West skriver: *"Samanborið við danir, so seta føroyingar seg ikki í serliga stóran mun føran fyri at taka orðið á almennum fundi, at skriva eitt lesarabræv ella kæra til myndugleikarnar".*

Jeg vil påstå, at der er mange her i landet, der ikke tør ytre sig offentligt af frygt for det færøske sprogpoliti.

**Overeksponering af rigsfællesskabets betydning**

Det er meget betænkeligt og direkte forkert, at Hallbera West ikke at tager højde for disse 3 forhold i sin evaluering og tolkning af en undersøgelse om færøsk medborgerskab og politisk kultur.

Yderligere tror jeg, at det er meget svært at sammenligne de store politiske enheder i Norden med mikrosamfundet Føroyar. Folk her i landet er generelt politisk og demokratisk bevidst. Men meget kommer bare ikke til udtryk, for her er den sociale kontrol og medfølgende selvcensur landsomgribende.

Ved at undlade disse ovennævnte parametre overeksponerer West for eksempel rigsfællesskabet som forklaringsmodel på undersøgelsens resultat. Hun indskriver sig dermed i en ældgammel ubrugelig offerrolleforklaring, der fjerner ansvaret for det færøske samfund fra det færøske folk. Dette gør at hendes konklusioner kommer til at lugte lidt for meget af overgemt tjóðveldisfims i stedet for at fremstå objektive.

**Demokratiet er baseret på det personlige ansvar for samfundet**

Min teori er lige omvendt. Det demokratiske underskud i det færøske samfund udspringer af religiøs og nationalistisk styring af tankegange og kultur, tilsat et ordentligt skud nepotisme, jantelog og konfliktskyhed. Denne giftige cocktail bevirker en omsiggribende mistro og manglende tillid til det færøske samfund, der igen gør, at de fleste ikke tør slippe den danske pat og stole på egne evner.

Det brugbare ved min teori er, at den placerer ansvaret for Føroyars evne til at klare sig selv hos dig og mig. Det er vi selv, der i daglig praksis må bekæmpe alle de negative kræfter, der nedbryder tilliden til samfundet. Ansvaret for tilliden til samfundet og for det færøske demokrati er vort. Uden tilstrækkelig tillid til mikrosamfundet Føroyar kommer den højt besungne loysing ikke.

**Objektive fortolkninger er nødvendige for at opgradere Føroyar til fremtiden**

Jeg synes det er beklageligt, at Hallbera West tilsyneladende ikke er vidende nok om færøske samfundsforhold og tilsyneladende ikke helt formår at holde sin politiske observans ude af sine fortolkninger. For vi har virkelig brug for gode, objektive og virkelighedsnære undersøgelser af det færøske samfund.

Og vi har endnu mere brug brug for objektive fortolkninger, der kan gennemhulle idealistiske og forkerte forestillinger om det færøske samfund, og som kan eksponere de egentlige problemer. Objektivitet er nødvendig for at opgradere Føroyar til fremtiden.

**Kilde:** Hallbera Fríða West: Medborgaraskapur og politisk mentan í Føroyum, Dimmalætting 15. aug 2008